# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fólkakirkjan – yvirtøka í semju

Orðaskiftið við fyrstu viðgerð av kirkjulógunum var áhugavert á mangan hátt. Hóast orðaskiftið í sjálvum sær ikki snúi seg um yvirtøkulógina, so avdúkaði hetta orðaskifti, at breið semja er á løgtingi um yvirtøku. Sjálv yvirtøkan fer sum kunnugt fram eftir yvirtøkulógini, sum eisini er á tingborði.

Hóast atfinningar frá serstakliga andstøðuni, so má staðfestast, at kirkjulógirnar fingu breiða og sera jaliga undirtøku undir fyrstu viðgerð. Tað, sum eyðkendi røðurnar hjá framsøgufólkunum, var, at fólkakirkjan hevur sera stóran og savnandi týdning fyri allar føroyingar. Hetta kann bert skiljast sum, at kirkjan eisini hevur týdning fyri tey, sum ikki eru limir í kirkjuni. Hóast onkra atfinnandi rødd, so var breið semja um hetta páhald, og ivaleyst er nakað um hetta. Fólkakirkjan hevur stóran týdning fyri okkara samleika og fyri trúarlívið sum heild.

Tað var eisini staðfest undir orðaskiftinum, at føroyska fólkakirkjan í roynd og veru altíð hevur verið ein rættiliga sjálvstøðug, hóast hon síðan trúbótina hevur verið undir útlendskari kirkjuligari yvirvøld. Kirkjan í Føroyum hevur í mongum førum havt øðrvísi siðvenjur og øðrvísið lógarreglur enn fólkakirkjan Danmark. Hetta er sera áhugavert og kann hetta bert skiljast sum, at yvirtøkan av fólkakirkjuni, sæð við kirkjuligum eygum, ikki er nøkur kollvelting, men ein liður í tí meninning móti meira sjálvræði, sum eyðkennir alt føroyska samfelagið. Hetta er bæði gott og rætt. Hvør verður so munurin, tá fólkakirkjan er yvirtikin, kann ein spyrja. Bert tíðin kann svara, men sjálvandi kann tað bert gagna kirkjuni, at allar avgerðarrættur er her í Føroyum hjá tí fólki, sum eigur og brúkar kirkjuna. Samantikið bendir alt á, at vit fáa eina yvirtøku í fullari semju, sum tað sømir seg í máli sum hesum.

**Sosialurin**

## Demokrati



**JAN HØJGAARD**
Føroya Fiskimannafelag

Nú frættist, at meiriluti er á Føroya Løgtingi fyri at skipa Føroyar til eitt valdømi.

Hetta fær ein at spyrja, hvørji felags áhugamál tey 10 fólkini, sum siga seg standa aftan fyri uppskotið, hava. Av royndum vita vit, at tey eru rættiliga ymisk, men allir flokkar eru kortini umboðaðir, og har eru bæði kvinnur og menn. Men eitt hol er kortini sjónligt; her hugsi eg um tey smáu valdømini - Vágar, Sandoyggin og Suðuroyggin. Ein freistast til at siga, at logikkurin er kortini intaktur. Í hesum valdømum eru ikki so nógvar atkvøður at heinta, og hví skal man so gera tað til eitt problem? Vit kundu skoytt uppí, at tað er umráðandi, at alt er so logiskt sum gjørligt!

Tey síðstu mongu árini hevur javnstøða ella manglandi javnstøða á tingi fylt nógv. Í løtuni hava einans tríggjar kvinnur sæti á tingi, og tær eru allar tríggjar fyri at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Og í so máta er eisini ein vissur logikkur galdandi, tí seinastu mongu árini hevur tað verið gott latín, at verða Føroyar eitt valdømi so verða automatisk fleiri kvinnur valdar á ting. Men sum kunnugt er ofta munur á teori og praksis, og tí verður tað sjálvandi spennandi at frætta, um teori og praksis halda á hesum øki.

Eg skal ikki taka mótið frá kvinnunum, men havi hug at siga, at tey sum halda, at her liggur ein automatiskur automatikkur kunnu lætt gerast vónsvikin, tá veljarin hevur valt.

Tí er tað umráðandi, at kvinnur gera sær greitt, hvat eitt løgtingsval snýr seg um. Tað vanliga "pena" prátið um, at kvinnurnar eru ov illa umboðaðar í løgtinginum hevur so at siga onga ávirkan á veruleikan. Tað átti at verið óneyðugt at nevnt, at tað er prógvað eftir hvørt einasta løgtingsval tey seinastu 20 - 30 árini.

Ein tann kendasta daman, tá talan er um kvinnur í politikki man vera Margaret Thatcher. Hon er tí eisini ein persónur, sum allar kvinnur, sum hava hug á einum sessi í løgtinginum eiga at seta kikarin á. Hópur av bókum eru skrivaðar um jarnkvinnuna, so tað átti ikki at verið nakar trupulleiki.

Skal vend koma í á hesum øki, er neyðugt, at tær sum droyma um ein løgtingssess mugu taka dreymin í álvara. Ella sleppa dreyminum og seta seg inn í, hvat løgtingspolitikkur snýr seg um. Harumframt er neyðugt at gevast at tøva í frasuni um at velja eina kvinnu bara, tí hon er ein kvinna. Tað er onki at ivast í, at tað er júst tann frasan, sum er ein orsøkin til, at kvinnurnar eru so illa umboðaðar sum tær eru. Heldur áttu vit at sagt, at so leingi vit hava demokrati, so eigur ongin at hava nøkur serrættindi. Halda vit ikki uppat at pjøssa við slíkum frasum kann støðan gerast upp aftur verri enn hon er. Ja - sleppa vit ikki hesum hugburðinum er vandi fyri, at eftir komandi løgtingsval fáa vit eitt løgting við ongari kvinnu.

Tí er tað umráðandi, at vit øll gera okkum greitt, at tey sum verða vald í løgtingið fáa nógvar og stórar fyrimunir, sum tey sum standa uttanfyri bert kunnu droyma um. Tað er hesin veruleikin, sum er altavgerandi, og tann, sum ikki hevur skilt tað hevur ongan tjans í kampinum um sessirnar og stóru fyrimunirnar, sum liggja í einum løgtingssessi.

Tað er onki at ivast í, at hjá mongum løgtingspolitikkara snýr valkampurin seg nærum lív ella deyð. Og hjá teimum er sjálvandi neyðugt at brúka øll kneb, - eisini tey minni demokratisku. Harumframt má alt leggjast til síðis í orrustuni.

Og nú eru vit komin til kjarnan í málinum.

Ein hevur varhugan av, at hesar treytir vilja rættuliga fá konufólk í Føroyum kasta seg undir? Og vit kundu spurt um nakað kann gerast við tað?

Kann at enda skoyta uppí, at eg, ta stuttu tíð eg havi sitið sum formaður í Føroya Fiskimannafelag, havi møtt stórum blíðskapi, sum eg onki kendi til frammanundan. Tað takki eg fyri!

## Eldradagurin 2007

*Tíðindaskriv frá Landsfelag Pensjónista*

Leygardagin 19. mai verður skipað fyri Eldradegi í Skopun. Pensjónistar úr øllum landinum hittast í ungmannafelagshúsinum »Samljóð« í Skopun til fjølbroytta dagsskrá, har ymisk evni til álvara og gamans verða havd á lofti.

Dagurin verður hildin frá kl. 9.00 til 17.00 við hesi skrá:

9.00 til 10.00 verður morgunkaffi/-te við rundstykkjum og øðrum.
10.00: Birgith Hentze, forkvinna fyri Pensjónistafelagið Kvøldarsól bjóðar vælkomin.
10.10: Borgarstjórin í Skopun, Gerhard Lognberg, flytur fram røðu.
10.30: Katrina Joensen, lærari, hugleiðir um kirkjuna.
11.00: Sangur við børnum.
11.30: Jóannes Eidesgaard, løgmaður, heldur røðu.
12.00 – 13.30 Døgurði.
13.30: Hanna á Reynatúgvu, ergoterapeutur, greiðir frá ymiskum hjálpartólum og skipar fyri løttum fimleiki, sum øll kunnu luttaka í.
14.00: Kaj Vilhelmsen, eygnalækni, heldur fyrilestur.
14.30: Palli Dalsgaard sigur frá.
15.00: Kaffisteðgur.
15.30: Umboð frá Almannastovuni greiðir frá løggávuni á eldraøkinum.
16.00: Spurningar og orðið frítt.
16.30: Lutaseðlar verða trektir.
16.45: Niclas Akraberg Poulsen, formaður í Landsfelag Pensjónista, ber fram heilsan til seinast.
17.00: Sangur og fráferð.
Fríðhild Winther verður fundarleiðari.
Kostnaðurin er kr. 200,- fyri hvønn luttakara fyri allan dagin.

Luttøka eigur at verða fráboðað í seinasta lagi 14. mai 2007 til eitt av hesum tlf.nr.: 361330 – 361322 – 361359 – 361381 –361505 – 373829
Ferðaætlan hjá Teistanum leygardag:
Av Gomlurætt: kl. 8.45; 10.30; 13.15...
Úr Skopun: kl. 12.30; 14.00; 16.30; 18.30; 20.15 og seinastu ferð 22.30.

Bussur koyrir millum ferjuleguna í Skopun og "Samljóð" í sambandi við tiltakið.

Stuðlað og hjálpt í sambandi við Eldradagin hava: Skopunar kommuna, Føroya Banki, Eik, Statoil Føroyar, Føroya Shell, Estra, Pensjónistafelagið Kvøldarsól og Landsfelag Pensjónista.

Fyrireikað Eldradagin 2007 hava: Pensjónistafelagið Kvøldarsól & Landsfelag Pensjónista.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.